


# MEGNAR TÚ AT STANDA STØÐUFASTUR, TÁ TAÐ BRÝTUR Í BÆÐI BORÐ?

**Størvini**
Fiskimálaráðið arbeiðir við at styrkja umsitingina av fiskivinnumálum. Tú fert at arbeiða við málum viðvíkjandi veiðiloyvum, fiskiloyvum, út- og innflutningsloyvum til skip og royndarloyvum, at umsita dátugrunn um fiskiloyvi og at skipa mannagongdir fyri málsviðgerð og fyrisiting okkara annars.

Fiskimálaráðið hevur sum mál at at spjaða vitan í ráðnum millum fólk og vit ynskja, at komandi starvsfelagar okkara eisini kunnu verða við til at skipa og menna eina virkna kunningartænastu hjá Fiskimálaráðnum

**Vit bjóða**
Vit bjóða starv við fjølbroyttum uppgávum og mennandi yrkisligum møguleikum saman við starvsfólki við hollum royndum innan ymiskar fakbólkar. Tú fært møguleika at ávirka arbeiðsinnihaldið og vera við til at skipa og menna mannagongdir bæði innan fiskivinnumál og kunningartænastuna.

**Førleikakrøv**
Fiskimálaráðið ynskir breidd í førleikunum hjá nýggju starvsfeløgum okkara. Ætlanin er tí at seta fólk við ymiskum førleikum, sum saman fevna um arbeiðsøkið.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, sum t.d. løgfrøði, samfelagsfrøði, fyrisiting, fiskivinnu, búskapi ella hagfrøði.

**Vit leggja dent á, at tú**
hevur hug og hegni innan fyrisiting og kunningartænastu, hevur evnini at skipa fyri og leggja tilrættis, arbeiðir sjálvstøðugt, orðar teg væl á føroyskum og á enskum, ert samstarvsfús/ur og kanst virka til lítar í einum umhvørvi, har mál ofta hava nógvan skund.

Royndir innan eitt ella fleiri av virkisøkjunum er ein fyrimunur.

**Setanar- og lønartreytir**
Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og aðalráðini annars.

Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing og øðrum skal sendast Fiskimálaráðnum á Heykavegi 6, Postrúm 347, 110 Tórshavn ella á fisk@fisk.fo og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. mars 2007, kl. 16.00.

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra á telefon 353241/andras@fisk.fo ella Marjun Magnussen, deildarleiðara á telefon 353217/marjun@fisk.fo.

***Fiskivinnustovan** er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, har høvuðsuppgávurnar eru: faklig ráðgeving í fiskivinnumálum · málsviðgerð og fyrisiting í sambandi við veiði- og fiskiloyvi · fiskiveiðusamráðingar við onnur lond og í millumlanda fiskiveiðufelagsskapum · at samskipa føroyska havtilfeingispolitikkin · fiskiídnaðarmál og marknaðarviðurskifti í breiðum høpi · granskingar- og menningarpolitikkurin hjá Fiskimálaráðnum · samskipan av kunning um fiskivinnupolitisk og -faklig viðurskifti.*

***Fiskimálaráðið** vegleiðir landsstýrismanninum innan málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir og hevur eisini eftirlit við, at hesar reglur verða fylgdar. Ráðið røkir samskipandi uppgávur innan málsøkini hjá landsstýrismanninum og stendur fyri fiskiveiðusamráðingum, luttøku í millumlanda og altjóða fiski- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*

## Lærlingar til Mylnuna



Søkt verður eftir bakara og kondittara lærlingi at arbeiða í Mylnuni, at byrja beinanvegin. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Hevur tú spurningar ert tú vælkomin at ringja á tel 214456.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.



Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!

## Ergoterapeutur / Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina

Á HTM er eitt fyribilsstarv sum ráðgevandi / málsviðgerandi Ergoterapeutur / Fysioterapeutur leyst at seta frá 01. apríl 2007 til 31. mars 2008, við møguleika fyri føstum starvi aftaná hetta. Talan er um fulltíðarstarv á 40 tímar um vikuna.

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga, sum hevur**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur.

**Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- teldufórleika á brúkarastøði.

**Vit kunnu bjóða**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flekstíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samarbeiði
- fakligt mennandi umhvørvi.

**Løn og setanartreytir**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á tel. 358300.

**Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til**
Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn, ella við telduposti til htm@almannastovan.fo.

**Umsóknarfreist**
Fríggjadagin 23. mars 2007.

KREA.FO - TEL 47 80 80

htm@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

HTM

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM. Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.: 1) upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar mynduleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar. 2) útlán og endurnýtslu av hjálpartólum. 3) viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar. 4) tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis.